# U-konsert






*Pauli Reinert Poulsen er gittarleikari í Proclaim*

ar duga.

Teir høvdu eina hampiliga framførslu, men teir megnaðu ikki at fáa áhoyrararnar at kóka. Teir spældu nakrar kendar lovsangir, og nakrar av sínum egnu.

Eg havi hoyrt teir betri, enn teir vóru leygarkvøldið. Kanska er tað tí, at allir limirnir í bólkinum spæla við øðrum bólkum og kórum, og tí ikki hava tíð til at leggja tað "eyka" í Proclaim.

Tað er heilt vist, at Proclaim kann koma langt, um teir vilja.

### Fín konsert

Samanumtikið var Humble Cry betsa upplivilsi á konsertini. Teir megnaðu best at fáa áhoyrararnar við uppá tað.

Teir høvdu møguleika at bergtaka fólk, tí at eingin hevði hoyrt teir áðrenn, og teir loftaðu hesum møguleikanum.

Hetta var ein fín konsert við ymiskum tónleikastílum. Vit gleða okkum til næsta ár!



*VOX við lívliga kórleiðaranum Ásbjørn Berthelsen á odda*

## Voxpopp

KONSERT

*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*



**Heini Niclassen**
- Konsertin var okey. Mær dámdi best Proclaim.



**Sólfríð Johannesen**
- Konsertin var ordiliga góð. Mær dámdi best Humble Cry. Tað var kul, at teir vóru so fjølbroyttir. Flott at 3 ymiskir syngja solo. Mær dámdi serliga væl tann tunga rokk/sálmasangin



**Jákup Berthelsen**
- Hetta var ein fín konsert. Mær dámdi best VOX, men ljóðið var tíverri ikki so gott til teirra framførslu. Hinir spældu eisini væl, men tónleikastílurin talar ikki til mín.